# handVERKARIN

1. ÁRSFJÓRÐINGUR 2010 BLAÐ NR. 33 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Til limirnar

**<u>Limagjald :</u>** Limir okkara gjalda kr. 450,00 um mánaðin, harav kr. 225,00 fyri lívstrygging og kr. 225,00 fyri limaskap. Tú rindar sjálvur limagjaldið. Tú kanst gera avtalu við Havnar Handverkarafelag, um at stovna fasta flyting.

**<u>Lívstrygging :</u>** Lívstryggingin er obligatorisk. Tað vil siga, at allir limir hjá okkum, skulu verða við í tryggingini.

**<u>Fráboðanarskylda :</u>** Sum limur hjá okkum, hevur tú skyldu at boða okkum frá, um broytingar henda í tíni limastøðu.

**<u>Eftirløn :</u>** Tú eigur sjálvur at kanna lønarseðilin, um tú fært eftirløn og um prosentini, sum tú og arbeiðsgevarin rinda, eru samsvarandi sáttmálanum. Tú ert eisini vælkomin at ringja og vita, um tað sum stendur á lønarseðlinum, <u>er goldið</u> til okkum frá arbeiðsgevaranum.

**<u>Bati :</u>** Bati er ein sjúkragrunnur, har tú kanst fáa endurgjald, tá tú ert sjúkrameldaður. Umsóknarskjal fast á www.handverk.fo ella á skrivstovu okkara. Treytin fyri útgjaldið er, at tú og arbeiðsgevarin rinda í grunnin.

**Tímalønt:**
Tímalønin er frá 1. okt. 2010 kr. 120,74 fyri sveinar.

**Mánaðarlønt:**
Samb. lønartalvur í sáttmálanum.

**Eftirlønin:**
Arbeiðsgevarin rindar 13% og løntakarin 2% áðrenn skatt.

**Eftirlønin til lærlingar:**
Arbeiðsgevarin rindar 7,5%.

**Frítíðarlønin:**
Frítíðarlønin er 12%.

## Innihald


Til limirnar 2
Stásilig hølir til ymisk endamál 3
Formansfrágreiðing 2010 4
Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags 9
Franklin D. Roosevelt beindi fyri búskaparkreppuni 14



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Stoffalág 60 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl 9 til 15.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

# Stásilig hølir til ymisk endamál





1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.
B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.
C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.
D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.
E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/fermingardag)
F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**
Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.
Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.
.
Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



# Formansfrágreiðing

**Aðalfundurin felagsins, sum varð hildin 24. mars 2010, var tann fyrsti, sum felagið hevur hildið í egnum hølum.**

**Fundurin varð hildin í ogn felagsins í Stoffalág 60, og var sera væl eydnaður í allar máttar. Tað eru mong ár síðani, at so nógvir limir vóru møttir til aðalfund, og tað er at fegnast um.**

## Ognir

Ogn felagsins í Stoffalág varð í fleiri ár leigað út til Tórshavnar kommunu. Fyri góðum árið síðani segði felagið leigumálið upp, og fór undir at innrætta húsini soleiðis, at felagið m.a. kundi hava skrivstovu og fundarhøli undir egnum taki.

Frammanundan hevði felagið skrivstovu í Sjúrðargøtu. Enn er støða ikki tikin til um ognin í Sjúrðargøtu skal seljast ella leigast út.

Kjallarahæddin í Stoffalág 60 er nú innrætta soleiðis, at skipast eisini kann fyri størri fundum og tiltøkum. Tí var í ár møguligt at halda ársaðalfund undir egnum taki.

Hugsað hevur eisini verið um at leiga kjallarahæddina út til samkomur sum t.d. føðingardagar, fermingardagar og onnur hátíðarhald. Í kjallarahæddini er eisini væl útgjørdur køkur, so møguleikarnir eru nógvir og góðir. Her er serliga hugsað um, at limir kunnu leiga kjallarahæddina til tiltøk, sum nevnd eru omanfyri, fyri ein lagaligan penga.

## 60 ára føðingardagsveitslan

13. februar 2010 skipaði felagið fyri veitslu til at hátíðarhalda seksti ára føðingardagin hjá felagnum. Og sigast skal, at vit vóru serstakliga væl nøgd við veitsluna. Alt gekk uppá stás, haldi ikki, at tað var nakað at seta fingurin á.

## Lærlingar

Í oktober mánað 2009 gjørdu vit saman við Starvsmannafelagnum, eina roynd at skipa fyri eini ráðstevnu fyri lærlingar.

Undirtøkan var kortini so mikið vánalig, at tiltakið varð avlýst. Tað meldaðu einans 3 lærlingar til, hóast tað var ókeypis at luttaka.

Í 2009 høvdu nakrar sakir viðvíkjandi lærlingum, sum føldu seg eitt sindur órættvíst viðfarnar. Vit hava sum oftast fingið tingini uppá pláss, uttan at blanda Yrkisdepilin uppí, men í onkrum føri var tað neyðugt.

## Fíggjarkreppan

Fíggjarkreppan hevur havt uppsagnir við sær, sum altíð er væntandi, tá ið so er. Tað er hugstoytt, tá ið tað hendir, men vit fáa ikki gjørt nakað við tað, annað enn at tryggja at sattmálin verður yvirhildin.

Eitt, sum vit hava bitið merkið í er, at fleiri fyritøkur fara av knóranum, tí skuldin er vorðin ov stór.

Tað er kanska ikki so undarligt, men vit hava mistanka um, at tað mangan verður spekulerað í hesum.

Tó má man harmast um, at vit ikki hava politikkarar, sum hava dirvi til at taka avgerðir, sum til dømis at seta almenn arbeiði í gongd, nú tað sansar at í privatu vinnuni. Tað átti at verið betur fyri landið, at arbeiði var til so



nógvar hendur sum møguligt, heldur enn at fólk ganga arbeiðsleys.

Eitt er tó batnað; tað er, at Als útgjaldið, er økt munandi, soleiðis at fólk nú eru betri tryggjað fíggjarliga.

## Ongin moralur

Vit hava havt onkur innkrevjingarmál ímóti fyritøkum, sum skylda løn, men her eru dømi um, at man elegant bara hevur flutt virðini í nýtt felag, fingi nýtt búðmerki, og so koyrt víðari sum um einki var hent. Handverkarar, tað almenna og aðrir kreditorar standa tá sum Kánus eftir við ongum. Hesar fyritøkur hava als ongan moral.

Hetta tykist at vera sum orðatakið sigur: Sektin á hvat annar far, eg skal nøra mær. Her haldi eg avgjørt, at myndugleikarnir eiga at stramma upp. Tað eigur ikki at bera til, at somu persónar, ferð eftir ferð sleppa at halda á fram, við at stovna fyritøkur við tí endamálið, at lata tær fara av knóranum, tá ið skuldin er vorðin stór nokk.

## Feløgini

Okkara endamál hevur altíð verið at fáa øll handverkarafeløgini í Føroyum, samanløgd í eitt meginfelag, men tað sær ikki út til, at tað verður í bræði. Vit vóna tó framvegis tað besta. Í oktober í ár gongur sattmálin hjá okkum út,



so tað verður spennandi at síggja, hvat samráðingarnar fara at enda við.

## Pensiónsreformur

Sum vit hava hoyrt og lisið, er ætlanin at gera ein níggjan pensiónsreform, sum tekur útgangsstøði í at øll skula betala minst 15% av inntøkuni til eina pensiónsskipan.

Tað er kanska ikki so fremmant fyri okkum, men tað sum liggur í kortunum er, at tað skal verða til eina lívlanga skipan. Tað vil siga at maks 10% av útgjaldinum, kann fara til uppsparing, og rest til lutapensión og lívrentu. Hetta hava vit rokna við, spurningurin var bert nær tað varð sett í verk. Hinvegin hava myndugleikarnir sagt, at tað sum er uppspart áðrenn nýggja skipanin verður sett í verk verður óbroytt. Tað vil siga, at tað verður útgoldið sum ætlað. Skilt verður ímillum, áðrenn og aftaná.

## Handverksdepilin

Sum fólk hava lagt til merkis stendur nú Handverksdepilin á felagshúsum okkara í Stoffalág. Grundin til tað er, at nú húsast Havnar Handverkarafelag, Eftirlønargrunnurin, Prentarafelagið og Landsfelag Handverkaranna undir somu lon, og tí var hildið hóskandi at kalla tað fyri Handverksdepilin.

Tað gevur so ella so eina slagkraft, og fellur væl í oyra. Sum fyrr sagt, er eisini ætlanin at fara undir at hava ymisk sosial tiltøk - m.a. at vísa útlendskan fótbólt, so limir kunna koma meiri saman.

## Skúladepilin

Nú røkist fyri, at Skúladepilin við Marknagil verður veruleiki. Tað er sanniliga eisini uppá tíðina, nú skúlin hevur verið politisk kastibløka í 75 ár.

Tað er komi so væl áleiðis, at projekteringin er farin í gongd. So er bert at vóna, at bygt verður áðrenn onkur polittikkari finnur uppá at broyta ætlanina. Tað er hent fyrr.

## Pam Offshore

Havnar Handverkarafelag hevur eisini sáttmála



við Pam Offshore um elektrikkarar, sum starvast fyri teir í Noreg.

Vit kunna bert ásanna, at tað hevur gingið heldur striltið við at fáa teir at yvirhalda sáttmálan, og tí hava verið fleiri fundir við teir um tað. Tað kann tykjast sum, at tað tekur alt ov langa tíð at fáa viðurskiftini uppá pláss, men tað hendur við hvørt, serliga tá ið partarnir




SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f. · Staravegur 17 · Postsmoga 3258
110 Tórshavn · Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir grannskoðarar

tulka sattmálan á ymiskan hátt. Hinvegin skal sigast, at vit hava gott samstarv við EL & IT forbundet í Noreg, og eru teir til stóra hjálp, tá ið ivamál taka seg upp.

## Tekniski skúli

Í hesum árinum hava vit verið 3 ferðir, úti á Tekniska skúla fyri at greiða m.a. frá um Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunnin. Lærlingar hava sum heild nógv uppá hjarta, og spyrja dúgliga. Tær afturmeldingar vit hava fingið, bæði frá lærarum og lærlingum, eru sera positiv, og er man samdur um at halda áfram við hesum.

## Vakstrar ætlan

Tórshavnar Býráð hevur sett ein arbeiðsbólk, at gera eina vakstrarætlan fyri komununa. Í hesum sambandi, hevur man sett seg í samband við vinnufyritøkur og fakfeløg, fyri at vita hvat hesir bólkar meina um framtíðar høvuðsstaðin. Tað hevur verið sera áhugavert at vera við í hesum, og hava vit havt nógvar og góðar diskusiónir um tað. Nú eftirfylgjandi hevur eitt samt Býráð, tikið undir við eini vakstrarætlan og visión fyri framtíðar høvðustað føroyinga.

## Lóg felagsins

Arbeitt verður við at endurskoða lógina fyri felagið, soleiðis at hon er meiri nútíðarhóskandi, tí givið er, at tað eru orðingar har, sum ikki hoyra nútíðini til. Tað eyðnaðist tíverri ikki at hava tað klárt til henda aðalfundin.

## Limagjald

Aftur í ár vísir roknskapurin, at eftirstøðan av limagjaldi er stór, hon er nakað minni, enn tølini siga, av tí at ein rímiligur partur kemur inn u.l. 3 januar. Men tað er eingin loyna, at eftirstøðan er ov stór.

Tað verður allatíðina gjørt eitt stórt arbeiði, fyri at fáa eftirstøðuna inn, men tað vísir seg, at so hvørt avtalur eru komnar uppá pláss, við teir sum skylda, so leggjast nýggjir skuldarar til.

Tað vísir seg at vera sum ein rullandi bóltur, og hyggja vit í gerðabøkurnar, sast at hetta mest sum altíð hevur verið ein trupulleiki. Vit hava ætlan um at leggja uppskot fyri aðalfundin komandi ár, um ein nýggjan innkrevjinghátt av limagjaldi, sum kann viðvirka at minka um eftirstøðuna.



# Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags




## Formansfrágreiðing 2010

Nú vit standa í 2010, og líta aftur á 2009, rennur mær í huga, at eg í fjør nevndi, at í 2008 hevði verið eitt rættiligt fíggjarligt ódnarveður. Í dag kunnu vit siga, at ódnarveðrið helt á nakað inn í 2009. Men nú eru vónir um, at tíðirnar eru batnaðar, so vit kunnu síggja ljóst upp á framtíðina.

Hóast búskaparliga ódnaðarveðrið í 2008 og 2009, so hevur eftirlønargrunnur okkara klára seg sera væl fíggjarliga.

## Íløgur

Sum flestu tykkara nokk longu hava sæð og hoyrt í fjølmiðlunum, so hevði eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags eitt sera gott ár í 2009, og tað var við einum vissum stoltleika, at vit kundu vísa okkara limum, at vit vóru tann eftirlønargrunnurin í danska ríkinum, sum kundi geva limunum eina tað bestu rentuna.

Tað kunnu vit gott siga, tí við at kanna eftir, er tað bert ein eftirlønargrunnur í Dannmark, sum hevur betri rentu enn vit, tað eru vit í nevndini sera stolt av.

Nevndin í eftirlønargrunninum hjá Havnar Handverkarafelag hevur altíð haft fyri eyga at vera sera varin við íløgunum, tí sum ein serfrøðingur á økinum segð; jú størri váða tú tekur upp á teg - jú størri er vinningurin - men tað kann líka so væl ganga hin vegin, at tú kann missa at kalla alt.

Og serfrøðingar meta í dag, at tað tekur eini 3 ár at vinna tað aftur, sum er mist tvey tey seinasti árini; har eru vit í tí støðu, at vit onki hava mist.

## Lág renta

Onkur kundi kanska spurt, hví vit ikki hava haft alt standandi í bankunum til hægstu rentu? Sum tit vita, so er bankarentan óvanliga lág, so trupult er at fáa tað heilt stóra burtur úr innistandandi í bankunum.

Tað er nú langt síðani, at rentan hevur verið so mikið høg, at penigurin ikki minkar í virði skjótari enn rentan klárar at fylgja við. Og so eitt afturat; fer bankin á húsagang, ið ikki er so ókent – eisini her hjá okkum – so eru vit bert tryggjaði 750.000 kr. Tað, sum liggur omanfyri missa vit um penigastovnur fer á



húsagang.

Tey seinastu tvey árini hevur danski staturin, tryggja øll innlán 100 %. Henda skipan heldur fram til fyrsta oktobur í ár. Vit hava haft ávísan part av tí, sum eftirlønargrunnurin umsitur, standandi inni til avbera góða rentu, ið vit hava samráðst okkum til.

## Eftirlønir

Eftirlønin hjá okkum er nú komin upp á 13% á privata arbeiðsmarknaðinum og 15% á tí almenna. Hetta var málið, sum vit settu okkum fyri nøkrun árum síðani. Tað málið er nú nátt, og tað er nakað, sum vit kunnu vera sera stolt av. Spurningurin er so, hvussu langt skulu vit fara við okkara eftirløn?

Skulu vit t.d. sammeta okkum við okkara politikkarar, so eru vit ongan veg komin enn.

Eg kann her til samanberingar nevna, at tað tekur einum landsstýrismanni ella einum tingmanni bert 8 ár at uppnáa fulla eftirløn. Tað svarar til, at teir fáa 60% av eini tænastumannaløn, hvat hon so enn er til ta tíð. Neyvan kann hon sammetast við okkara lønir ella eftirlønir.

Í okkara føri tekur tað omanfyri 30 ár ella fyri at vera heilt neyvur, heili 37 ár at koma upp á fulla eftirløn.

Og tað, sum vit harumframt skulu minnast til er, at tað eru vit sjálvi, sum mugu gjalda okkara eftirløn, meðan politikkararnir líka sum kunna kvitta fyri sína eftirløn.

Sum áður sagt er einasta krav, at teir skulu vísa á, at teir hava sitið 8 ár í tinginum. Hvat teir hava gjørt, ja, tað hevur minni at siga, so har er munur á.

Tá vit gerast 67 ár - handverkarin og politikarin - og vit skulu fáa okkara eftirløn útgoldna, so fær politikkarin 60% av einari tænastumannaløn, meðan vit fáa tað, ið vit hava spart saman øll tey mongu ár, sum vit hava goldið inn í okkara eftirlønargrunn.



Tað kemur ikki nær í námind av tí, sum ein polittikari fær.

Kanningar vísa, at skuldu vit fingið tað sama, skuldu vit ikki goldið 15%, men heili 27,5%, so har má sigast at vera munur á fólkum.

## Kapping um eftirlønir

Í seinastuni eru komnir fleiri aktørar á banan, tá talan er um eftirløn í Føroyum.

Vit hava verið í tøttum dialogi við føroysk tryggingarfeløg og hava haft ymsar møguleikar á borðinum. Tað veri seg bæði um eftirlønar-grunnin og tryggingina. Okkara niðurstøða er, at teir higartil ikki kunna bjóða okkum nakað betur enn tað, ið vit longu hava.

Sama kann sigast um føroysku peninga-stovnarnar. Tí eru vit komin til ta niðurstøðu, at føroyskir peningastovnar og tryggingarfeløg ikki kunna bjóða okkum eitt nøktandi tilboð, tá talan er um eftirløn og tryggingar.

## Útreiðslur

Tá vit tosa um útreiðslur, kann eg ikki annað enn fegnast um, at vit higartil hava megnað at hildið útreiðslunum á einum sera lágum støði. Hetta kemst av at vit sjálvi umsita grunnin. Vit skulu ikki vinna nógvan pening til ein ella annan stóran íleggjara.

Nei, alt sum kemur inn í efturlønargrunnin, kemur limum okkara til góðar.

Eftirlønargrunnurin umsitur peningin og tilskrivar okkum rentir, líka til vit verða 67 ár, og longri - líka til vit fara foldum frá.

Eg havi av mínum eintingum kannað fleiri eftirlønargrunnar, og enn havi eg ikki funnið ein einasta eftirlønargrunn, sum er líka bíligur at reka sum okkara eftirlønargrunnur, hvørki í Føroyum ella uttanlands.

## Starvsfólk

Eftirlitið við eftirlønargrunnum og bankum er hert hetta seinasti árið. Tað er nokk ein avleið-



ing av fíggjarkreppuni - og tað er bara gott - at eftirlitið er hert.

Hetta setur størri krøv til okkara umsiting, sum frammanundan ikki er stór.

Tað, at vit hava eina lítla umsiting ger, at tað ikki er so dýrt at umsita peningin í okkara grunni.

Og her má sigast, at tey, sum starvast á skrivstovuni hjá okkum, og sum dagliga gera arbeiðið við at skráseta limir, sundurgreina eftirlønargjøld, kanna at arbeiðsgevarin flytur tað, ið hann skal, svara telefonum og nógv annað. Hesi fólk gera eitt stórt og týdningarmikið arbeiði.

Eg vil takka teimum, og fara so langt sum at siga, at uttan teirra ágrýtni, var ongin eftirlønargrunnur. Enn einaferð; stóra tøkk fyri gott arbeiði. Takk til tykkum øll somul.

## Grannskoðari

Og so er tað sjálvandi eisini grannskoðari okkara, sum verður spurdur til ráðs, um so er, at vit skulu broyta ella umstilla nakað. Hon er dugnalig og altíð holl í ráðum.

Og so er tað eisini aktuarurin hjá okkum. Eitt av krøvinum sum Tryggingareftirlitið setur, er, at um vit skulu virka sum eftirlønargrunnur so skulu vit hava ein aktuar knýttan at okkara eftirlønargrunni. Vit hava ikki ein aktuar ansettan í eftirlønargrunninum, tað hevði verði alt ov kostnaðarmikið. Í staðin keypa vit okkum tær tænastur, sum kravdar verða til eina og hvørja tíð.

## Pensiónreformur

Politiska skipanin hevur arbeitt við einum



pensjónsreformi. Ætlanin er, at hvør tann einasti lønmóttakari skal gjalda inn í ein góðkendan eftirlønargrunn. Fyri 2010 er tað galdandi, at ongin kann gjalda meira enn 25 túsund krónur til kapitaleftirløn.

Alt omanfyri 25 túsund skal fara til eina lívslanga eftirlønarskipan – ella í eina ratupensjón. Hetta er bara byrjanin. Politikkarnir hava millum annað sagt, at teir miðja eftir, at bert 10 % av tí persónliga partinum kann gjaldast út í einum. Restin skal í eina lívrentu ella í lívlanga eftirlønarveiting.

Miðað verður eftir, at landskassin skal sleppa heilt ella partvíst undan at gjalda eftirlønir til okkum, tá vit koma til eftirlønaraldur. Tí kunnu vit eisini siga, at vit í dag eru væl tryggjaði við okkara eftirlønargrunni.

## Ábyrgd

Eg fari hervið at heita á limirnar um sjálvi eisini at ansa eftir, at tit fáa útgoldið tað, ið sáttmálin sigur. T.v.s. at arbeiðsgevarin flytur tað, sum hann eigur at flyta.

Her hugsi eg serliga um, at tit kanna eftir um eftirlønin, sum er ein partur av lønini hjá tykkum eisini verður flutt til Eftirlønargrunnin.

Sjálvandi kanna skrivstovufólk okkara um alt verður goldið, sum eigur at vera goldið, men har kann okkurt fara framvið uttan, at tað verður fangað.

Hetta eru tykkara pengar, og so skulu vit heldur ikki gloyma, at hetta eftir hondini er ein stórur partur av lønini.

# Franklin Roosevelt beindi fyri

USA kom í 1920-árunum inn í eina ríka fíggjarliga uppgongutíð. Vinnulívið stóð í besta blóma. Verksmiðjurnar gingu við fullari ferð. Vørur í hópatali vórðu oystar út á marknaðin. Lønirnar ruku upp og livikrøvini hareftir; fólk fingu sær nýggj teknisk amboð av ymiskum slag: t.d. radio, dustsúgvarar, vaskimaskinur, kuldaskáp og bilar.

Og gravgangurin eftir virðisbrøvum var stórur; tað var ein lættur máti at vinna pengar uppá, tí virðið av brøvunum hækkaði dag frá degi. Stutt eftir at fólk høvdu keypt tey, kundu tey, um tey vildu - selja tey aftur við stórum vinningi. Nógv settu eisini pening í bankar og fingu góða rentu fyri teir.

Hetta var sum í ævintýrunum. Fólk vóru full av trúgv upp á framtíðina, og roknaðu við, at vælferðin var komin fyri at vera. Men soleiðis skuldi ikki vera.

## Búskaparkreppan tekur seg upp

Sum tjóvur á nátt kom kreppan – ein kreppa, ið ikki bert kom at fáa avleiðingar fyri USA, men eisini fyri Evropa og stórar partar av heiminum við. Hetta var í 1929.

Kreppan byrjaði sum eitt skrædl á børsinum. Knappliga fór virðið á brøvunum at falla. Í fyrstani uggaðu fólk seg við, at virðið fór skjótt at hækka aftur. Men virðið fall og fall við hættisligari ferð. Bert ein dag fall virðið í miðal við 40 prosentum. Nú gjørdust fólk ræðslusligin. Øll vildu selja síni virðisbrøv, men nú vildi brádliga eingin keypa. Eftir stuttari tíð høvdu amerikanarar mist umleið 40 milliardir dollarar í virðisbrøvum.

Skrædlið á børsinum fekk lagnutungar avleiðingar fyri alt tað amerikanska samfelagið. Vøruprísirnir lækkaðu. Hetta komu teir, ið framleiddu vørurnar, at svíða fyri, og nógvar verksmiðjur og aðrar fyritøkur noyddust at siga arbeiðsmonnum upp og lata aftur. Eftir einum ári vaks talið á arbeiðsleysum frá tveimum milliónum til umleið fjúrtan. Lønirnar hjá teimum, ið høvdu arbeiði, lækkaðu niður í triðing av tí, tær høvdu verið frammanundan.

Bøndurnir, ið annars ikki høvdu fingið lut í ágóðanum av uppgongutíðini, fingu ikki selt vørur sínar við vinningi. So hendi tað, at teir heldur settu eld á kornið og stoyttu mjólkina í ánna. Nógvir av teimum høvdu fingið sær dýrar landbúnaðarmaskinur og sett seg í stóra skuld. Nú vóru teir ikki førir fyri at gjalda skuldina, og í túsundatali noyddust teir at rýma av gørðunum.

Bankar runt í øllum landinum fóru av knóranum, og pengarnir, fólk høvdu spart sær saman har, fóru fyri skeyti. Stórur partur av tí amerikanska fólkinum smokkaði niður í neyð og fátækdømi. Dreymurin um vælferðina varð við eitt sorlaður.

Mistreysti og vónloysi øktust manna millum. Stjórnin gjørdi lítið og einki fyri at bøta um skaðarnar í samfelagnum. Heldur uggaði hon fólkið við, at tað fór at lýsa í hvørja løtu. Men fólk leit ikki á slíka talu. Tey kravdu at stjórnin skuldi gera okkurt, so landið kundi bjargast úr hesi ræðuligu kreppuni.

Slík var støðan, tá Franklin Delano Roosevelt gjørdist forseti í USA. Hann stillaði upp til forsetavalið og lovaði at gera alt, hann kundi fyri at vinna á kreppuni. Hann duldi ikki fyri at støðan var hættislig. Men hann hevði álit á framtíðini, tí hann leit á treystið hjá tí amerikanska fólkinum. Eftir hansara ætlan galt tað fyrst og fremst um at stimbra áræðið, ikki geva seg undir, men djarvur herja á trupulleikarnar. Tá vildi ósigur gerast sigur. Júst einum slíkum manni, á tremur av vón og áræði, var tað, tjóðin hevði brúk fyri. Hann var valdur til forseta við stórum meiriluta. Hetta var í 1932. Seinni



varð hann afturvaldur ikki minni enn tríggjar ferðir í nýggj 4 ára skeið. Slíkt var ikki hent fyrr í søgu USAs.

Franklin D. Roosevelt var av múgvandi fólki. Faðirin átti stór landaøki í statinum New York, og drongurin vaks upp í einum tryggum og eydnuríkum heimi. Móðirin væntaði sær nógv av honum. Tá ið hann var vorðin forseti, varð hon spurd, um hon ikki var ovfarin av at síggja sonin í Hvítu Húsunum, forsetaborgini í Washington. "Als ikki," svaraði hon, "soleiðis havi eg altíð hugsað mær tað." Ættin hevur áður fostrað ein forseta, Theodore Roosevelt (1848 – 1919).

Foreldrini ferðaðust nógv, og Franklin var ikki meir enn 2 ára gamal, tá ið tey fyrstu ferð høvdu hann við sær til Europa. Sum ungur sigldi hann um atlantshavið nógvar ferðir, og hann kom at kenna europeisk viðurskifti væl.

Sína fyrstu skúlaundirvísing fekk hann heima av heimalærarum. Hann varð ikki sendur í vanligan skúla, fyrr enn hann var 14 ára gamal. Sum næming gav eingin honum gætur fyri nakað serligt avrik, hann gjørdi, ella evnir, hann hevði; hann var bert ein vanligur miðalnæmingur.

Vinir hansara frá tí tíðini siga um hann, at hann var ein hugnaligur, meinaleysur drongur, kanska eitt sindur stórlátaður, men annars ikki ein, tú gavst tær serligt far um.

Tá ið hann hevði lokið sína skúlagongd, fór hann undir at lesa løgfrøði og fekk seinni starv í einari sakførarafyritøku. Men hann leiddist við hetta starv, hann fekk ikki rásarúm fyri síni virkistrongd. Í 1920 – 28 ára gamal – fór hann upp í politikk. Hann læt seg stilla upp sum valevni til lóggávutingið, senatið, í statinum New York.

Franklin D. Roosevelt var aldri ræddur fyri at royna nýggjar og óroyndar leiðir. Tað kom til



sjóndar undir valstríðnum. Hann leigaði sær ein opnan, reyðan bil, sum kundi koyra so ótrúliga skjótt sum 35km um tíman, og soleiðis ferðaðist hann runt í valdøminum og helt røður – í bygdum, á vegamótum, á markini – ja, stutt sagt allastaðni, har hann kundi savna eina áhoyrarafjøld. Tað var fyrstu ferð har í valdøminum at nakar hevði nýtt bil í einum valstríði. Um hetta hevði nakra ávirkan á valúrslitið skal vera ósagt, men hann varð í øllum førum valdur inn í senatið fyri statin New York. Tað kom skjótt at kennast, at hann hevði óvanliga góð evnir sum politikari. Hann hevði tokka til medmenniskju síni og var ein ógvuliga dámligur maður; fólk fingu álit á honum. Hann hevði nógv áhugamál, var altíð opin fyri nýggjum hugsanum og dámdi væl at arbeiða og fáa nakað gjørt. Hann var ikki røddur fyri at fara í hernað fyri málum, hann trúði uppá, og hann hevði serligar gávur til at virka í røttu løtu. Bløðini fóru at skriva um hann – hann gjørdist kendur sum politikari.

Í 1912 varð heitt á hann um at koma upp í stjórnina sum varaflotamálaráðharri, og hann tók beinanvegin av. Hetta starvið hevði hann í 7 ár. Tá ið fyrra heimskríggj brast á í 1914 – og

serliga aftaná at USA í 1917 var farið upp í kríggj – var stór ábyrgd løgd á hann. Men honum dámdi at hava ábyrgd, og hann km ógvuliga væl frá sínum starvi. Hesi árini vann hann sær stóran politiskan kunnleika. Hetta kom honum til gagns seinni í lívinum.

Eftir at hann var farin úr tí krevjandi embætinum í stjórnini, tók hann aftur upp starvið sum sakførari. Tey flestu hildu tó, at hetta bert var ein millumleikur. Hann fór óivað at halda fram á sínari politisku lívsleið. Roosevelt var ikki 40 ára gamal, og hann var kendur sum ein framúrskarandi politikari. Alt bendi á, at hann gekk ímóti einari glæsiligari framtíð.

Tá var tað, at ein ræðulig vanlukka rakti hann.

Ein dagin hann var staddur á landinum var hann farin at svimja. Vatnið var Kalt. Tá ið hann kom aftur at húsunum, setti hann seg í teimum vátu svimjibuksunum við skriviborðið at hyggja postin ígjøgnum, hann hevði fingið um morgunin. Tá kom so ræðuligur skjálvti á hann, og hann mátti fara til songar. Dagin eftir hevði hann fepur, og hann gramdi seg um pínu í beinunum. Men støðan versnaði, sum dagarnir gingu, og hann hevði ilt við at ganga. Tað sást nú á øllum brøgdum, at hann var við at gerast lamin.

Hann hevði fingið ta ræðuligu poliosjúkuna.

Hetta var ein dyggur smeitur fyri tann sterka og lívsglaða mannin. Men tá ið hann var komin yvir tann fyrsta skelkin, fekk hann lívsviljan aftur. Hann vildi ikki viðganga, at hann var avlamin, hann vildi ikki gevast so. Hann ætlaði at fara í hernað móti sjúkuni og vísa, hvør av teimum var sterkari.

Eldhugaður byrjaði hann at venja vøddarnar upp aftur. Í tímar kreyp hann aftur og fram eftir gólvinum sum eitt lítið barn. Í urtagarðinum vórðu fimleikaramboð sett upp, og har vandi hann seg at ganga, soleiðis at kropstyngdin hvíldi á ørmunum. Uppi yvir songini var hongd upp ein vinda, og við henni royndi hann at lyfta beinini upp og niður fyri á tann hátt at fáa lív í aftur. Hann vendi seg dag og dagliga við at streva seg einsamallur upp gjøgnum trappurnar. Við ørmunum, ið vóru treystari enn beinini, dró hann kroppin stig fyri stig, spakuliga við nógvari pínu, meðan sveittin lak av honum. Seinni hoyrdi hann um ein polio-sjúkling, ið var batnaður nógv, eftir at hann hevði tváað sær í vatni úr einari heitari keldu. Hann fór beinanvegin til ta heitu kelduna og baðaði í fleiri vikur í hesum grøðandi vatninum. Orsakað av trýstinum í vatni var tað nógv léttari at røra armar og bein undir vatninum. At enda gav hansara treiskni úrslit. So við og við fekk hann fulla styrki aftur í ørmunum. Men tað eydnaðist honum ikki at vinna á lammilsinum í beininum. Tey vóru skadd fyri lívið.

Hann fekk sær beinspjálkar, og tá ið teir vóru spentir fastir, og hann styðjaði seg við einum stavi ella til eitt fólk, kundi hann so dánt standa upprættur. Við nógvum stríði var hann eisini førur fyri at flyta seg. Men við ongum spjálkum var hann heilt hjálparleysur. Tá mátti hann vera borin ella koyrdur í rullistóli.

Sjúkan hevði rakt hann meint. Men samstundis hevði hon gjørt hann sterkari sálarliga. Í tí áhaldandi stríðinum móti sjúkuni, sum hann ongantíð hevði givið seg undir, hevði hansara lívshugur sigrað. Nú kendi hann seg betur enn nakrantíð fyrr. Hann visti, at hann hevði eina sálarstyrki, ið var før fyri at standa móti harðasta ágangi.

Í tí torføru tíðini, meðan hann hevði verið sjúkur, hevði konan hansara, Eleanor Roosevelt – ein hjartagóð og vitug kvinna – gjørdi sítt ítasta fyri at hjálpa mannin sínum. Nú eggjaði hon honum til at taka tað politiska arbeiðið upp aftur. Har hevði hann sítt lívstarv, helt hon, og var tað nakar heilivágur, ið kundi upplíva hann, so mátti tað vera politikkur.

Endin varð, at Roosevelt læt seg stilla upp

sum valevni til guvernør, t.v.s. ovasta leiðara í statinum New York. Nógv óttaðust fyri, hvussu hann, ein kryplingur, kundi vera førur fyri at røkja eitt so krevjandi starv. Men sum ein av hansara vinum segði: "Einum guvernøri nýtist ikki at vera fimleikari. Vit velja hann ikki til at bólta rút." Tað sást skjótt, at Roosevelt tørvaði ikki styrki. Ágrýtin fór hann upp í valstríðið, og í 1928 varð hann valdur í tað starvið, ið av nógvum varð hildið at vera tað hægsta næst forsetastarvinum.

Meðan hann var guvernørur, kom kreppan í 1929. Neyðin og armóðin vaks dag frá degi, ikki bert í statinum New York, men í øllum USA. Roosevelt setti ikki hendur í favn, sum stjórnin hevði lyndi til at gera. Hann meinti, at staturin hevði skyldu at hjálpa teimum, ið ikki kundu klára seg sjálvi. Í USA var hetta, ið Roosevelt førdi fram, nakað heilt nýtt og ókent. Á ymiskan hátt royndi hann at bøta um neyðina. Millum annað fekk hann viðtikið, at New York sum tann fyrsti staturin í USA veitti almennan stuðul til arbeiðsleys.

Hansara ágrýtna arbeiði fyri at bøta um avleiðingarnar av kreppuni í New York gjørdi hann til ein víðagitnan Mann. Hann kom uppá tal sum forsetavalevni.

Í USA eru tveir stórir politiskir flokkar: tann republikanski og tann demokratiski. Líka frá byrjanini av 1920-árunum høvdu republikanarar sitið við róðrið. Men teir høvdu ikki megnað at stýra landinum, so tann meinigi borgarin kundi hava livilig kor. Hetta kom týðiliga til sjóndar í tíðini aftan á kreppuna í 1929.

Í 1932 var forsetaval. Demokratarnir stilladu Franklin D. Roosevelt upp sum valevni, og teir vóru vísir í, at teir fóru at sigra.

Roosevelt ferðaðist um alt landið og helt





## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo

DYMO Esselte PILOT uni-ball LEITZ

# Skrivstovuútgerð til dyrnar




## Útkoyring

**City er heildarveitari av skrivstovuútgerð til vinnulív og stovnar. Hugmyndin er, at alt til skrivstovuna fæst á einum stað. City hevur tríggjar deildir um landið, umframt nethandilin city.fo og útkoyringartænastu.**

Sum landsins størsti heildarveitari av skrivstovuútgerð leggja vit dent á at bjóða tað besta og størsta vøruúrvalið. Flestallar vørur, ið tit hava tørv á dagliga, eiga vit á goymslu – og skuldu vit ikki átt tær, so bíleggja vit fegin.

Prísirnir á útkoyringartænastuni eru nú broyttir, soleiðis at tú altíð veitst, hvat kostnaðurin er.

Fyri vanliga útkoyring verður tikið eitt ómaksgjald á **kr. 80**.*

Fyri bíleggingar, ið eru størri enn kr. 3.000, verður ***einki útkoyringargjald*** tikið.*

** Bert galdandi fyri útkoyringarleiðina.*

### *Skjót útkoyring*

*Bílegg **innan kl. 11** og tú hevur vøruna sama dag**

city
www.city.fo

| Tórshavn | Klaksvík | Runavík | Bílegging |
|---|---|---|---|
| 347 300 | 347 310 | 347 320 | 347 340 |

# Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV






Tel 34 10 10 **ATLANTIC AIRWAYS** atlantic.fo


AMBOÐ
TIL EITT OG HVØRT
ENDAMÁL
2X3
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN
MULTI MASTER TOP
3198,00
DURASPIN DS275 AC
inkl. 12000 stk 39A35mp
2998,00
DEWALT KAP OG
GERINGSSAG DW718
8998,00
METABO AKKU BS 18V LI
2 x battarí (2,2ah lithium)
2498,00
BAHCO
BLACK&DECKER
metabo
LASER-PROF
SENCO
DEWALT

valrøður. Dóttir hansara sigur í einari frásøgn hvussu trupult mangan hann hevði tað likamliga á slíkum ferðum kring landið:

"Einaferð skuldi hann halda eina røðu í eini stórari høll, eg haldi tað var í Brooklyn. Tá ið vit komu hagar, sóu vit, at tað var ongin inngongd beinleiðis inn á pallin, og einasti upp í høllina var ein breið steintrappa, og har var einki at halda sær í. Pápi vildi ikki fara eftir tí longu miðgongdini, tí so kundu fólk lættliga halda, at hann royndi at ávirka tey og fáa tey at hava samkenslu við sær. Tað var sum statsmaður, hann vildi vera valdur. At enda funnu vit eina bratta jarntrappu við handataki, sum var gjørd, um eldur skuldi komið í. Við sínum sterku ørmum hálaði hann seg seigliga upp eftir hesi brøttu trappu. Tað gekk seint og stríggið, og ofta mátti hann steðga á til at rinda møðina. Men hvørja ferð hevði hann okkurt skemtiligt á munni. Vit, sum vóru hjástødd, vóru ikki bangin fyri, at hann skuldi detta, men vit vistu, hvussu tað píndi hann, at vit skuldu síggja, hvussu hann stríddist og hvussu sjúkan nívdi hann. Tá ið hann at enda var komin upp, dreiv sveittin av honum, og skjúrtan var rennvát. Hann steðgaði so frægt á, at hann fekk turkað sveittan av andlitinum. So fór hann inn á røðarapallin og byrjaði við at siga okkurt skemtiligt um hitan í høllini."

Í røðum sínum vendi hann sær beinleiðis til tann vanliga mannin – "the forgotten man", tann gloymda manninum, sum fyrst kom at kenna sviðan av niðurgangstíðini. Nú ráddi um at fara til verka, segði hann, fara í bardaga móti kreppuni. USA var í veruleikanum eitt ríkt land, og tað galt fyrst og fremst um at nýta ríkidømið rætt. Staturin hevði skyldu til at fáa hjólini aftur at mala og framleiðsluna at økjast. Staturin hevði eisini skuldu til at bøta um ta óhugnaligu neyðina, ið ráddi í milliónum av heimum í USA.

Hann savnaði stevnuskrá sína undir loysunarorðinum "New Deal". Henda máliskan er tikin úr korstpæli og merkir "nýggj kort" ella "nýggj gáva". Tað, ið landinum tørvaði, var júst "at geva av nýggjum" í politikkinum. Tey gomlu kortini vóru ov vánalig, tey kundu ikki nýtast longur. Hann gav veljarum sínum lyfti um at skipa fyri "at geva av nýggjum", fáa eina nýggja byrjan í tað amerikanska samfelagið, bert tey vildu geva honum heimild til tess.

Valdagin góvu veljararnir honum svarið. Roosevelt var valdur til forseta við stórum meiriluta. Hann var tá fimti ára gamal.

Sama dagin, hann var settur í embæti sum forseti, helt hann eina langa røðu um tey nógvu og stóru vandamál, landið kom at dragast við. Men hann var fullur av áliti á, at landið tó skuldi berja seg gjøgnum kreppuna og náa fram til eina nýggja vælferð. Tað, ið umráddi var, at fólkið helt út og fall ikki í fátt av vantreysti og ótta fyri morgindegnum.

"Eg trúgvi fult og fast uppá, at tað einasta, vit hava at óttast, er óttan sjálvan – tann navnleysa, høpisleysa, ógrundaða óttan, ið leggur alt virksemi lamið, ið er neyðugt, fyri at afturgongd aftur skal gerast framgongd." Hann kendi tað sum sína fyrstu og mest átrokandi uppgávu at kveikja nýggja vón í ta amerikansku tjóðina, av tí at hann visti, at sjálvt tann besti politikkurin var nyttuleysur, um fólki ikki átti álit á sær sjálvum, og hann var til reiðar at taka eitt tak til tess at vinna á trupulleikunum. Hann endaði við hesum orðum:

"Fólkið í USA hevur ikki svikið. Í neyðarstundini hevur tað sýnt, at tað ynskir, at nakað verður gjørt og tað skjótt. Tað hevur biðið um fastleika og vegleiðing undir einari sterkari leiðslu. Tað hevur valt meg sum amboð fyri sínum ynskjum. Eg átaki mær uppgávuna í gevarans anda."

Teir næstu tríggjar mánaðirnar – "teir hundrað dagarnar", sum amerikanararnar rópa teir – varð so nógv avrikað sum ongantíð áður í søgu USAs. Roosevelt og hjálparmenn hansara arbeiddu nátt og dag fyri at vinna á

kreppuni. Dag um dag vóru týdningarmiklar fyriskipanir settar í verk. Strangt eftirlit var havt við børsinum og øllum bankum í landinum. Ein stórfingin studningsskipan fyri landbúnaðin varð viðtikin. Stórar nøgdir av peningi vóru játtaðar til at seta í verk arbeiðir til tey arbeiðsleysu. Fyri at fáa pening til allar tær nýggju fyriskipanirnar varð eykaskattur lagdur á tær høgu inntøkurnar, og útreiðslurnar hjá statinum vórðu skerdar á øllum økjum, har tað læt seg gera.

Seinni vórðu aðrar ábøtur gjørdar. Um alt landið vóru bygdir skúlar og leikvøllir, vegir, byrgingar og ravmagnsverk. Mýrilendi vóru avveitt og gjørd til dyrkilendi. Nýggir skógir vóru plantaðir. Men tað týdningarmesta mundi tó vera tað, at tað nú fyri fyrstu ferð í USA vórðu settar í gildi almennar tryggingarskipanir, bæði arbeiðsloysistrygging og ellistrygging.

Týdningarmikil var eisini viðtøkan um, at arbeiðsmenninir nú fingu rætt til at samráðast við arbeiðsgevararnar um lønarspurningar við umboðum, teir sjálvir høvdu kosið sær. À hesum grundarlagnum festi fakfelagsrørslan røtur, fakfelagsrørslan, sum síðan tá hevur havt eina sterka støðu í tí amerikanska samfelagslívinum.

Tann kendasta av øllum "New Deal"-fyriskipanunum, ið gongur undir heitinum TVA (Tennessee Valley Authority). Tað var ein ætlan, ið hevði til endamáls at fáa tamarhald á tí stóru Tennessee-ánni, ið rennur ígjøgnum 7 statir. Við hesum tiltøkunum var ætlanin at stuðla vinnulívinum í økinum fram við ánni, so tað kom allari tjóðini til gangs. Heldur enn at gera seg inn á náttúruna, ið fólk ofta hava lyndi til, skuldi arbeiðið hereftir samskipast við náttúruna fyri at varð veita náttúruríkidømið og skapa nýggjar gróðrarvánir, eina nýggja tilveru.

Tennessee-dalurin var eitt tilafturskomið øki. Íbúgvarnir vóru fátækir og heilsuviðurskiftini út av lagi vánalig. Bøndurnir dugdu ikki at fáa jarðarbrúkið at geva nóg mikið av sær. Nógvastaðni vóru skógirnir høgdir niður, og avleiðingarnar av hesum vóru óbøtiligar, eitt nú aftaná á áarføri, ella tá ið Tennesseeáin floymdi upp um áarbakkarnar, og tað hendi ikki so sjáldan. Trærøtur súgva nevniliga vætuna úr jørðini og binda moldlagið. Men tá ið røturnar fúnaðu burtur, varð moldin skolað út í ánna og førd til havs. Á henda hátt var um helvtin av allari jørðini í Tennessee-dalinum matað burtur.

Fyrsta stigið í TVA-ætlanini var tí at byggja veldigar byrgingar og at fáa tamarhald á vatninum, so sleppast kundi undan vatnflóðum. Samstundis vórðu stór ravmagnsverk bygd, so at allur dalurin fekk el-streym. Framleiðsla av kunsttøðum til landbúnaði varð sett í verk. Vánalig jørð varð plantað við skógi. Fiskistovnurin í ánni var stimbraður á ymiskan hátt. Saman við hesum tiltøkum fór fram stórfingin útbygging av skúla- og heilsuverkinum í dalinum. Eftir fáum árum var Tennessee-dalurin vorðin eitt fyrimyndarligt øki við tíðarhóskandi landbúnaði, blómandi ídnaði og við fólki í góðum korum.

Roosevelt var tó ikki altíð líka heppin við sínum ábøtingarætlanum. Sumt av tí, hann hevði sett í verk, varð sett úr gildi av hægstarætti. Men nógv varð tó verandi og fekk varandi virði. Og fram um alt annað: tað hevði eydnast honum at skapa ein nýggjan anda í fólkinum. Tað var eins og eldhugi hansara og dirvi hevði ávirkað alla tjóðina. Amerikanararnir høvdu vunnið á óttanum og fóru framtíðini ímóti fermdir av tí trúgv og áliti, ið Roosevelt sjálvur átti.

"Eg havi aldri hitt eitt slíkt menniskja, sum kundi geva øðrum eina so sterka kenslu av tryggleika," sigur kona hansara. "Kanska serliga tí, at eg ongantíð hoyrdi hann tala um, at nakað vandamál var til, sum menniskju ikki vóru før fyri at vinna á. Men hann sá trupul-

# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*




Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

**Húsavarðartænastan**

leikarnar og segði ofta, at tó at hann ikki kendi loysnina, var hann tó heilt vísur í, at tað fanst ein loysn, at onkustaðni var eitt menniskja, ið kundi loysa knútin, og at ikki mátti gevast, fyrr enn loysnin var funnin, annaðhvørt ein sjálvur kom fram á hana ella onkur annar. Hann talaði aldri eitt orð um, at hann ivaðist. Tá ið hann ætlaði at seta nakað í verk, leitaði hann altíð ráð hjá øðrum og gjørdi eftir teimum bestu ráðunum, hann kundi fáa. Men tá ið hann hevði tikið eina avgerð, spilti hann ikki tíðina burtur við at hugsa um, annaðhvørt hon var røtt ella ikki." Aldri sá hon hann møta lívinum ella vandamálunum við ótta, sigur hon.

Roosevelt fekk sera stóra undirtøku frá meirilutanum av tí amerikanska fólkinum. Men hann fekk eisini nógvar beiskar fíggindar, serliga millum handilsfólk og múgvandi góðseigarar. Teir vóru í øðini um teir høgu skattirnar, og teir hildu, at Roosevelt fór ov lætt um peningin hjá tí almenna. Nógvir amerikanarar hildu eisini, at hann ofta gjørdi nakað skjótt av og hugsaði ov illa ígjøgnum tað, hann gjørdi. Teir óttaðust serliga fyri, at politikkur hansara skuldi taka støðið undan "tí fría framtakinum" í vinnulívsvaldinum. Teir hildu, at tað almenna fekk ov stórt vald, ið borgararnir komu at gjalda aftur við mistum frælsi.

Í 1930-árunum vóru meira enn tríggir fjórðingar av øllum dagbløðunum í USA ímóti Roosevelt, og tey komu við hvøssum álopum á hann og politikk hansara. Tí er tað sera áhugavert, at hann í 1936 varð afturvaldir til forseta við størsta meirilutanum, ið nakrantíð hevði verið til eitt amerikanskt forsetaval. "Roosevelt hevði øll ímóti sær uttan veljararnar," sum ein politikari tók til. Í 1940 varð hann valdur fyri triðju ferð. Higartil hevði eingin amerikanskur forseti sitið longur enn tvey fýra ára skeið.

Í Europa vóru tveir harðrendir menn komnir til ræðið: Adolf Hitler í Týsklandi og Benito Mussolini í Italia. Teir dubbaðu seg av øllum alvi og løgdu við harðskapi undir seg fremmand landaøki. Eisini í Fjareystri var ein hættislig álopstjóð. Japanarar lupu á Kina og hóttu við at herseta alt landið. Tað gjørdist so við og við greitt, at heimsfriðurin var í vanda.

Tann størsti parturin av tí amerikanska fólkinum helt kortini, at kríggjið kom ongantíð at røkka USA. Tey kundu liva í frið og náðum á tí amerikanska meginlandinum, um so heimurin annars kom at standa í ljósum loga. "Lat bert tann gamla heimin berjast og klórast, sum hann vil – vit í tí nýggja heiminum ynska at vera uttan veltað," var tann vanliga hugsanin manna millum. Tey, ið soleiðis hugsaði, vóru nevnd isolationistar; tey vildu, at USA skuldi halda seg uttan fyri hin partin av verðini. Roosevelt vendi sær av øllum alvi ímóti slíkari avbyrging. Hann var sannførdur um, at kom kríggj, so slapst ikki undan, at USA fyrr ella seinni mátti koma uppí, annaðhvørt fólk ynsktu tað ella ikki. "Hugsið ikki," ávaraði hann, "at Amerika sleppur undan, at Amerika kann vóna náði, at okkara vesturheimur ikki verður álopin."

Í 1939 brast kríggjið á í Europa. USA var fyribils ikki við, tað var uttanveltað. "Men eingin skal trúgva," segði Roosevelt, "at vit eru uttanveltaðir í hugunarhátti." Hann visti fullvæl, at um tað eydnaðist hersetingarlondunum at týna fólkaræðið í Europa, so kom USA at standa fyri skotum. "Vit mugu ver tann stóra vápnasmiðjan hjá fólkaræðinum," segði hann og gjørdi hareftir. Ein ovurhonds framleiðsla av krígsamboðum var sett í gongd, og so við og við kundi USA senda vápn og útgerð í hópatali til teir sameindu, fyrst og fremst Stórabretland.

Tann 7. desember 1941 vaknaði tann amerikanska tjóðin við kaldan dreym: Knappliga, uttan krígsavbjóðing, høvdu japanarar gjørt eitt oyðandi sniðálop á tann amerikanska kyrrahavsflotan í havnini í Pearl Harbor á Hawaii-oyggjunum. Harvið kom USA upp í kríggið í parti við teimum sameindu, ímóti

# SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR








fría øll tey øki aftur, fíggindin hevði lagt undir seg.

Stórir amerikanskar herdeildir vóru eisini sendar til Europa í bardaga móti Týsklandi. Teir luttóku í innrásini hjá teimum sameindu í Norðurafrika í 1942, teir vóru við í herferðini norður gjøgnum Italia í 1943, og teir áttu ein avgerandi leiklut í innrásini í Frankaríki á sumri 1944 og seinni í álopinum hjá teimum sameindu gjøgnum Frankaríki og inn í Týskland.

Fleiri ferðir undir krígnum hevði Roosevelt persónligar samrøður við bretska forsætisráðharran, Winston Churchill. Nakrar ferðir kom eisini fundur í lag millum "teir tríggjar stóru" – Umframt Roosevelt og Churchill eisini tann sovjetiska leiðaran, Josef Stalin. Á hesum fundunum løgdu teir ætlanir um krígsførsluna og talaðu um krígsspurningar hjá teimum sameindu. Í vesturheiminum eru seinni atfinningar gjørdar at Roosevelt fyri støðu hansara mótvegis Stalin undir hesum tingingunum. Nógv halda, at hann leit ov nógv á tann sovjettiska einaræðisharran og slakaði ov nógv fyri honum í Eystureuropa.

Sum frá leið, tá ið teir sameindu herarnir stríddu seg fram á øllum vígvøllunum, fekk Roosevelt nógv um at vera av tí stóra spurninginum: at fyrireika friðin. Tað gjørdist teimum flestu greitt, at um nakar skuldi gera sær vón um at fáa ein verandi frið í lag aftan á tað ræðuliga kríggið, mátti ein felagsskapur av øllum heimsins londum setast á stovn – ein felagsskapur, ið bygdi á vóngott samarbeiði. Á tí síðsta fundinum millum Roosevelt, Churchill og Stalin komu teir ásamt um at kalla saman til eina ráðstevnu í San Francisco á vári 1945 við tí endamáli at gera nærri ætlanir um ein slíkan altjóðafelagsskap. Á hesi ráðstevnuni,

"ásaveldunum" Japan, Týsklandi og Italia.

Tað stóð nógv á Roosevelt í hesi tíðini; hann hevði bert áhuga fyri einum, og tað var at vinna kríggið. Ferð eftir ferð vendi hann sær í sínum kendu "fire-side chats" (prát við grúgvuna) í útvarpinum til tað amerikanska fólkið fyri at gera teimum greitt, hvat stríðið galt, og fyri at stimbra viljan á tjóðini at vera við í krígnum. Og amerikanrar tóku undir við forsetanum sum ongantíð fyrr.

Í kyrrahavsøkinum fóru japararir undir víttfevnandi atsóknir, og í fyrstuni høvdu teir stóra framgongd. Teir løgdu undir seg Phillippuoyggjarnar og herjaðu síðan á øki á tí asiatiska meginlandinum. Her løgdu teir Burma, tað nú verandi Thailand undir seg og ahrtil alla Malakka-hálvoynna við tí sterku bretsku herstøðini, Singapore. Eisini oyggjarnar Java, Sumatra og Borneo komu undir Japanskt vald, og teir hóttu við at leypa á Australia og India. At enda eydnaðist tað amerikanarum styðjaðir av bretum at støðga tí japansku atsóknini. Stórar amerikanskar herdeildir vórðu savnaðar í Australia og herstøðum har nærhendis, og í 1942 fóru teir undir mótálop. Í blóðigum bardøgum róku teir japanrararnar aftur, og tað eydnaðist tey komandi árini at

har umboð úr 51 londum luttóku, varð so samtyktin um Sameindu Tjóðirnar viðtikin. Hon kom í gildi tann 24 oktober – tann dagin, sum síðan tá hevur verið hindin um allan heim sum ST-dagurin.

Men Roosevelt eydnaðist hvørki at uppliva sigurin hjá teimum sameindu í krígnum ella fremjanina av Sameindu Tjóðum. Í 1944 varð hann afturvaldur til forseta fyri eitt fýra-ára skeið. Men tað gjørdist so við og við greitt, at tær veldugu byrðurnar, ið lagdar vóru á herðar hansara, tóku honum dygt. Við endan á krígnum var hann í veruleikanum ein uppslitin maður, og um miðjan apríl mánað fekk hann heilabløðing og doyði, 63 ára gamal.

Deyðsboðini vórðu móttikin í milliónum av amerikanskum heimum við djúpari sorg. Eleanor Roosevelt hevur sagt, at hansar hægsta ynski og mál altíð hevði verið at gera lívið lættari hjá tí meiniga manninum og kvinnuni. Fólk kendu tað, sum høvdu tey mist ein vin, ein stuðul í lívsbardaganum.

Í eini røðu, sum Roosevelt helt í 1941, myndaði hann framtíðarheimin, soleiðis sum hann helt, tað var møguligt at fremja hann "í okkara tíð og í okkara ættarliði". Tað var ein heimur ið skuldi byggja á 4 grundleggjandi frælsi:

"tað fyrsta frælsið at siga sína hugsan – um allan heim. Tað annað er frælsið fyri øll menniskju at dýrka Gud á egnan hátt – um allan heim. Tað triðja er frælsið úr neyðini. Flutt yvir á verulig viðurskifti merkir hetta fíggjarligt samarbeiði, ið tryggjar tjóðunum eina fríska og friðarliga tilveru – um allan heim. Tað fjórða er frælsið frá óttanum. Í veruleikanum merkir hetta heimsumfatandi avvápnað, so væl grundaðan, at eingin tjóð skal vera før fyri at nýta hernaðarligt vald móti sínum granna – nakrastaðni í heiminum."

Um Roosevelt hevði upplivað árini eftir kríggið, hevði hann verið stórliga vónbrotin. Dreymur hansara varð ikki framdur. Tey fýra frælsini vóru lítið vird í millumlanda politikki. Stórveldini dubbaðu seg sum ongantíð fyrr, misálit og hatur eitraðu viðurskiftini landanna millum, og alt bendi á, at harðskapur als ikki hevði avspælt sín leiklut sum hjálparamboð í politikkinum. Sjálvur slapp hann undan at síggja sín dreym sorlaðan.

Men hansara orð verða standandi. Fara tey nakrantíð at verða tikin í álvara? Fara tær aðalbornu hugsjóninar hjá Roosevelt einaferð at gerast veruleiki ?

Glarmeistarin v/Poul Guttesen.



Søla og montering av
lágorkutermorútum ,
u-virði níður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo

Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




Battariir Til Øll Endamál

Fartelifonir



Hoyri Apparatir

Ur og mangt annað



Eisini hava vit øll vanlig battariir





Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir

PÓLAR

elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo

Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl




# KOM TIL EFTIRLIT VIÐ TÍNUM BÚSTAÐARLÁNI

Eik Banki P/F
Tel. 348 000
www.eik.fo

**Hevur tú rætta bústaðarlánið? Við Realkreditt frá Eik fært tú eina bústaðarfígging, ið hóskar júst til tín**

Avtala tíð til eftirlit á www.eik.fo og/ella á tlf. 348 000



UPP TIL
32%
Nýggj avsláttarskipan
Betur tú ert tryggjaður, størri avsláttur fært tú
trygging.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
Betri pensjón